Hey Jórun

Vit hava umrøtt bæði uppskotini til løgtingslóg í felagnum trolbátum, og sær tað út fyri okkum sum eru broytingarnar ikki so stórar í vavi, men meir eitt framhald av tí sama, tískil meta vit ikki í hesum førum tað vera neyðugt at koma í vinnunevndina at gera viðmerkingar til júst hesi uppskot.

Vit vilja tó gera fylgjandi stuttu viðmerkingar til at leggja fram fyri vinnunevndini:

Tað skal sigast at torført er at fáa yvirblikk yvir allar broytingarnar, sum er nevndar í uppskotinum, og hartil hoyringsfreistin stutt.
Men felagið trolbátar er framvegis av teirri áskoðan at tað er sera umráðandi at halda fram við fiskidagaskipanini, ímun til kvotur.

Eitt sum er alt ov ógreitt fyri aktørunum í 4T, er tá talan verður um útskifting/endurnýggjan av skipum, ímun til uppskoti.
Áður var hetta veri skipa í kunngerð, hvar LxBxDxhk bleiv brúkt. Tann reglan hevði avbjóðingar við sær, men ímun til nýggju sjófeingis-lóggávuni mælir felagið trolbátar til at fáa greiðar mannagongdir/kunngerð um slíkar tilgongdir tá talan gerst um veiðievni osv.
Tá tað kemur til at bjóða veiddan fisk út á uppboðsølu, kann upplýsast at bólkur 4T bjóðar áleið 95% av tí veidda fiskinum út á FMF sum er, og hevur hetta veri gjørt tey seinastu 15 árin. Í hesum sambandi hevði tað veri gagnligt fyri bólk 4T og aðrar skipabólkar at møguleikin fyri at landa omkran túr uttanlanda (10%), serliga nú meiri toskur er at fáa og vit tíðum merkja avbjóðingarnar á landi hjá virkjum og útflytarum tá størri fiska-nøgdir koma uppá land.

Tá tað kemur til at leggja gjald á veiddan fisk(tilfeingisgjald), hóast tað ikki er partur av hesum broytingunum, hevur felagið trolbátar greiðar fatanir og metir eina innkalling frá vinnunevndini vera alneyðuga, um so er at tað uppskoti kemur í løgtingið í komandi tíðum, soleiðis at okkara sjónarmið á tí økinum vera væl lýst.

Vinarliga,
Bjarni í Skálum